**Nám X, Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 1/2012: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 2, nr. 1 verður orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Í 9 ára grundskúlanum skulu allir næmingar verða undirvístir í:

1) føroyskum øll skúlaárini
kristnikunnleika 1. – 7. skúlaár
donskum 3. – 9. skúlaár
enskum 4. – 9. skúlaár
søgu/samtíð 4. – 9. skúlaár
religión 8. – 9. skúlaár"

2) § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Í 10. flokki skulu hesar lærugreinir standa næmingunum í boði: Føroyskt, danskt, støddfrøði, kristnikunnleiki, religión, mannarættindi/fólkarættindi, ítróttur, samtíð og enskt."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2012.

**Viðmerkingar:**
Ætlandi skulu næmingar hava kristinkunnleika frá 1.-7. flokk, og tá næmingurin síðan kemur í framhaldsdeildina ( 8.og 9. flokk), skal lærugreinin eita "Heimsátrúnaður / Religión".

Orsøkin til at gera hetta í framhaldsdeildini er, at vit meta, at næmingurin er nóg búgvin til hesa broyting í lærugreinum, tá hann er 14-15 ár ( 8.flokkur).
Hetta ger eisini, at tey ungu fáa eina breiðari vitan innan hesi evni um moral og etikk, soleiðis at næmingurin ikki bert veit, hvat kristindómur er, men eisini veit, hvørjir allir hinir átrúnaðirnir í heiminum eru, og hvat teir snúgva seg um. Næmingurin skilir sostatt betur útheimin í framhaldandi alheimsgerðini.

Eisini ber hetta við sær, at multi-kulturellar rasur kunnu trívast í øllum lærugreinunum og vera við í tímunum, hóast tey eru av øðrvísi uppruna ella hava øðrvísi átrúnað.

Við at broyta hesa lærugrein merkir hetta eisini, at lærararnir skulu hava breiðari vitan sjálvir, tí krav skal setast til læraran, so at næmingurin veruliga fær eina breiðari vitan innan hesi evni.
Eisini kann hetta elva til eina minni "fordómsfulla" tjóð, tí man kann síggja tingini frá øðrvísi sjónarhornum og skilja umstøðurnar aðrastaðni, og síðan sjálvur taka eina avgerð.

Í 10. flokki verður mælt til, at bæði religión og mannarættindi/fólkarættindi standa næmingum í boði.

Ynskiligt er, at Mentamálaráðið ber soleiðis í bandi, at meira tilfar verður framleitt til fakini religión og mannarættindi/fólkarættindi.

**Á Løgtingið 6. februar 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Jens Petur Old | Páll Rasmussen Weihe | Benjamin Rajani |
| Rani Høgnason Hansen | Virgar Johansen | Egi Djurhuus |
| Teitur Horn Baldvinsson | Benjamin Miné Midjord | Jógvan í Dímun Højgaard |

Hervør Pálsdóttir